## Snýta ikki

Tey seinastu trý árini eru 117 partafeløg farin í sjálvbodna avtøku, men landsstýrismaðurin í fíggjarmálum heldur ikki, at fólk hava gjørt tað fyri at sleppa undan at gjalda skatt av vinningsbýti. Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldisflokkinum, heldur harafturímóti, at høvdu øll tøl komið á borðið, høvdu løgtingsfólk ásannað, at hol eru, sum mugu typpast. Bárður Nielsen er sambært Útvarpinum samdur við honum, men sigur, at uppgávan er arbeiðskrevjandi.

## VÍS til Føroya

Íslendska tryggingarfelagið Vátryggingafélag Íslands, vanliga nevnt VÍS, hevur gjørt av at stovna eina deild í Føroyum, so skjótt tey formligu viðurskiftini eru í lagi, skrivar Dimmalætting. Høgni í Stórustovu, sum verður leiðari á føroysku deildini hjá VÍS, sigur vð blaðið, at tey bíða eftir, at Løgtingið skal avgreiða lógaruppskotið um trygging í Føoryum. Í fyrstu atløgu fara ætlandi umleið fimm fólk at arbeiða á føroysku deildini hjá VÍS.

# Eitt valdømi bati fyri javnstøðuna

**Hóast avleiðingin av einum valdømi helst er, at fleiri kvinnur koma inn, so setir tað eisini størri krøv til floksapparatini at fáa kvinnurnar fram. Hetta sigur Kári á Rógvu, formaður í Javnstøðunevndini**

JAVNSTØÐA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*



*Kári á Rógvu, formaður í Javnstøðunevndini*

Verða Føroyar eitt valdømi, verða eisini fleiri kvinnur valdar á ting. Hetta hevur mangan verið ført fram í javnstøðuprátinum. Ein orsøk til hetta er, at fólk í útjaðaranum eisini fáa møguleika at atkvøða fyri teimum sterku kvinnuligu valevnunum, og at hesar soleiðis fáa eitt størri atkvøðugrundarlag.

### Aðrar loysnir eru

Kári á Rógvu, formaður í Javnstøðunevndini sigur við Sosialin, at eitt valdømi givið er ein bati fyri javnstøðuna.

- Men, um endamálið skuldi verið meira javnstøða, so hevur Javnstøðunevndin víst á í øllum førum tvær aðrar loysnir, sum kunnu útjavna kynsbýtið í tinginum, sigur Kári á Rógvu.

Hann sigur seg vóna, at tingið tekur hesi bæði uppskotini við, um ætlanir kortini eru um at broyta vallógina. Uppskotini snúgva seg um at fáa meiri javnstøðu í sambandi við uppstillingina. Annað gongur uppá, at býta listaatkvøðurnar út á undirumboðaða kynið, fyri á tann hátt at hála tað longur upp á listan.

- Hetta eru atkvøður, sum flokkurin kortini hevði fingið, men sum undirumboðaða kynið tá fær gagn av, sigur hann. Javnstøðunevndin heldur eisini, at tað hevði verið rætt, um javnstøða var á øllum uppstillingarlistunum, og allarbest, um teir eisini vóru raðfestir, sum vit kenna tað úr øðrum Norðurlondum.

### Veik floksapparat

Formaðurin í Javnstøðunevndini leggur stóran dent á, at við einum valdømi verða krøvini til floksapparatini nógv herd.

- Sum er, eru floksapparatini heldur veik. Nú er vandi fyri, at tey sterku, sum hava miðlatekki, ráð og tíð at føra valstríð, verða tey somu, sum verða vald. Flokkarnir hava ikki fyrireikað seg til hetta øðrvísi valstríðið, sum millum annað krevur, at teir gera uppstillingarlistar, sum bæði taka lokal atlit, og hugsa um kyns- og aldursbýtið. Nú er vandi fyri at kvinnurnar fara at halda seg aftur, eisini í flokkunum, tí pengar og orka verður nýtt til at fáa sterku menninar fram. Tí hevði tað verið uppaftur meira upplagt at havt raðfestar listar nú, sigur Kári á Rógvu, sum eisini heldur at flokkarnir nú áttu at gjørt nógv meira við at fyrireika kvinnurnar til valstríð.

### Veljaraatferðin broytist

Kári á Rógvu sigur seg annars harmast um, at hendan kollveltandi broytingin í politiska landslagnum verður framd so knappliga.

- Uppstilling eigur at fara fram í góðari tíð, og eitt valstríð eigur at vera væl fyrireikað. Hetta er ikki minst galdandi fyri kvinnurnar, sum kanska ikki hava so drúgvar royndir við at selja seg sjálvar, sigur Kári á Rógvu.

- Broytingin er somikið stór, at hon átti at verið framd fyrr í valskeiðinum. Og enn einaferð eru vit vitni til, at ongin veljari verður spurdur, sigur hann, og vísir á, at veljarin eisini broytir veljaraatferð, tá skipanin broytist.

- Nú er eisini vandi fyri, at summi verða uppaftur meira lokal, tí tey savna seg um eitt valevni, sum veljarin kanska ikki er so samdur við idéologiskt, sigur Kári á Rógvu. Kortini sigur hann, at tað góða við einum valdømi er, at vit nú sleppa undan hesum løgna við at størsti flokkur ikki fær flest umboð.

# Meginøkið undirumboðað á tingi

**Verður sammett við fólkatalið, gevur býtið av tingsessum útjaðaranum fyrimun fram um meginøkið. Størstu ójavnarnir eru í Sandoyar og Suðurstreymoyar valdømum.**

HAGTÍÐINDI
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Tað er bert einaferð hent, at tingmannatalið og fólkatalið hava verið púra samsvarandi. Hetta var aftan á løgtingsvalið í 1943, tá tingmannatalið var 25. Í øllum hinum 23 løgtingsvalunum, sum verið hava síðani 1924, tá skipanin við eykavaldum kom í, hava skeivleikar verið, sigur Hagstovan á heimasíðu sínari.

Stovnurin hevur gjørt eitt yvirlit yvir býtið av tingsessum í ymsu valdømunum, í mun til fólkatalið. Sagt verður, at nú orðaskifti aftur hevur tikið seg upp um, at Føroyar skulu vera eitt valdømi, er áhugavert at gera upp, hvussu væl tingsessirnir í roynd og veru eru býttir millum valdømini sammett við fólkatalið.

### Verri eftir 1978

- Fólkatalið er ikki bara broytt nógv í tølum, eisini er lutfalsliga býtið millum valdømini nógv broytt. Mest eyðsýnda broytingin er miðsavningin, har Suðurstreymoyar valdømi gerst alt størri partur av heildini. Hetta rákið er alla tíðina, men tók serlig dik á seg aftan á kríggið og fram til sjeytiárini. Tað sæst eisini, at tað mesta av hesi miðsavning er farið burturav partinum hjá Suðuroyar valdømi, har minkingin upp á seg hevur verið størst, sigur Hagstovan á heimasíðuni.

Hagstovan hevur eisini gjørt upp býtið av tingsessum upp á valdømini, og henda myndin er meira ófriðarlig. Áðrenn 1978 sveiggjaði umboðanin bæði uppum og niðurum tað lutfalsliga fólkatalið, so í longdini gjørdist býtið av tingsessum yvirhøvur rættiliga beint. Men aftan á 1978 hava skeivleikarnir í hvørjum einstøkum valdømi næstan altíð vent sama veg, so skeivleikarnir ikki longur verða útjavnaðir sum tíðin gongur.

### Javning við eykavaldum

Spurt verður eisini, hvussu væl tingsessirnir eru býttir. Og har sigur Hagstovan, at uppgerðin er ikki heilt so líkatil, tí bert talið á umdømisvaldum liggur fast. Eykavaldir tinglimir kunnu fella á ymis valdømi, og talið kann eisini skifta. Yvirhøvur er valskipanin soleiðis, at tann lutfalsligi ójavnin í umdømisvaldum verður javnaður nakað aftur við eykalimunum. Bert einaferð er tað komið fyri, at tingmannatalið og fólkatalið hava verið púra samsvarandi. Hetta var til løgtingsvalið í 1943, tá tingmannatalið var 25. Í øllum hinum 23 løgtingsvalunum, sum verið hava síðani 1924, tá skipanin við eykavaldum kom í, hava skeivleikar verið.

### Vága valdømi rættast

Myndin vísir greitt, at síðani 1978 tá núgaldandi vallóg kom í gildi, hava Norðuroyggjar og sunnanfjørðsvaldømini havt fyrimun, meðan meginøkið hevur verið undirumboðað. Vága valdømi hevur hinvegin havt lutfalsliga rætta umboðan á tingi síðani líka síðan 1966.

Meðan nettoskeivleikin eftir vallógini frá 1924 tilsamans bert kom upp á 11 sessir eftir 15 løgtingsvalum, er nettoskeivleikin eftir galdandi vallóg komin upp á 17 sessir eftir bert 9 løgtingsvalum.

| Valár | Norður-oyggjar | Eysturoy | Norður Streymoy | Suður Streymoy | Vágar | Sandoy | Suðuroy |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1924 | ÷1 | +1 | +1 | · | · | · | ÷1 |
| 1928 | · | · | · | +1 | · | · | ÷1 |
| 1932 | · | ÷1 | · | · | · | +1 | · |
| 1936 | ÷1 | ÷1 | · | +1 | +1 | · | · |
| 1940 | +1 | · | · | · | · | · | ÷1 |
| 1943 | · | · | · | · | · | · | · |
| 1945 | +1 | · | · | · | · | · | ÷1 |
| 1946 | ÷1 | · | · | · | · | +1 | · |
| 1950 | · | ÷1 | · | · | +1 | +1 | ÷1 |
| 1954 | · | · | · | ÷1 | +1 | · | · |
| 1958 | · | · | ÷1 | ÷1 | +1 | · | +1 |
| 1962 | · | · | · | ÷1 | +1 | · | · |
| 1966 | ÷1 | ÷1 | · | +1 | · | +1 | · |
| 1970 | ÷1 | · | · | · | · | +1 | · |
| 1974 | · | · | · | ÷1 | · | +1 | · |
| **Tils. 1924-1974** | **÷3** | **÷3** | **·** | **÷1** | **+5** | **+6** | **÷4** |
| 1978 | +1 | ÷1 | · | ÷1 | · | +1 | · |
| 1980 | +1 | · | ÷1 | ÷1 | · | +1 | · |
| 1984 | · | ÷1 | · | · | · | +1 | · |
| 1988 | +1 | · | ÷1 | ÷1 | · | +1 | · |
| 1990 | +1 | · | ÷1 | ÷2 | · | +1 | +1 |
| 1994 | · | · | ÷1 | ÷1 | · | +1 | +1 |
| 1998 | · | ÷1 | +1 | ÷1 | · | +1 | · |
| 2002 | · | ÷1 | · | ÷1 | · | +1 | +1 |
| 2004 | · | · | · | ÷2 | · | +1 | +1 |
| **Tils. 1974-2007** | **+4** | **÷4** | **÷3** | **÷10** | **·** | **+9** | **+4** |
| **Tils. 1924-2007** | **+1** | **÷7** | **÷3** | **÷11** | **+5** | **+15** | **·** |

*Talvan her vísir, hvussu nógvar tingsessir hvør valdømið fekk ov nógv/lítið, um tingmanningin varð býtt eftir fólkatali*